MIÐFLOKKURIN

hvørt vikuskifti í Sosialinum

- familjuvinarligur
- barnavinarligur
- bíbliutrúgvur

**MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI**



Unn Hentze

## Profilurin

**Navn:** Unn Hentze
**Aldur:** 38 ár

Eg eri 38 ára gomul og havi tveir deiligar synir. Eri útbúgvin skrivstovukvinna, men lesi nú Sjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya.

Tað eru fleiri grundir til, at eg stuðli Miðflokkinum. Her skal eg nevna nakrar.

**Familjan:** Sum stakur uppihaldari veit eg, hvussu torført tað er at fáa endarnar at røkka saman. Miðflokkurin setur familjuna, kanska serliga børnini, høgt á dagsskránna. Hóast hann ynskir at stuðla kjarnufamiljuni, er hann varugur við tann veruleika, at tað eisini finnast familjur við einum vaksnum við børnum, og hesi børnini verða ikki gloymd.

**Bústaðir:** Miðflokkurin vil virka fyri, at øll skulu hava møguleika fyri at ogna sær egnan bústað, ella, um ein ikki er førur fyri at búgva í egnum bústaði, geva møguleika fyri t.d. sambýli ella røktarheimi.

Tey kristnu virðini: Tað er altavgerðandi fyri land okkara, at vit halda fast við tey kristnu virðini. Bara tað at hava ein flokk sum Miðflokkin, ger at tað verður rykt eitt sindur i hinar flokkarnar, sum - í teirra humanismu - eftir mínari meining, hava lyndi til at gloyma tað etiska grundarlagið, sum byggir á Bíbilsku grundreglurnar, og sum land okkara er bygt á.

Eg føli, at vesturheimurin, og eisini Føroyar, fer longur og longur burtur frá kristindóminum og haldi tí, at nú er tíðin komin, at øll trúgvandi eiga at standa saman um at fáa tey kristnu virðini innaftur í lóggávu okkara. Hettar kann, millum annað, gerast við at velja Miðflokkin.

M.a. hettar, og at Miðflokkurin er ein loysingarflokkur, ger at eg gevi honum mín fulla stuðul.

**visti tú, at:**

Miðflokkurin í einari komandi samgongu aktivt vil virka fyri at peningurin fyri t.d. ansing skal fylgja barninum, so foreldur fáa valmøguleikan at ansa barni sínum heima!

Miðflokkurin við fleiri uppskotum hevur roynt at vinna familjum við fleiri børnum eyka barnafrádrátt- eitt av hesum uppskotum verður viðgjørt í Løgtinginum í hesum døgum!

Miðflokkurin í einari komandi samgongu vil raðfesta umstøðurnar hjá barnafamiljum, herundir einligum forsyrgjarum, høgt og forða fyri at nakar flytir, vegna betri umstøður í grannalondum okkara.!

www.midflokkurin.fo



# Sansir søkja fyriskipara

Sansir søkja fyriskipara, sum skal skipa okkara arbeiði innanhýsis, fáa tað at glíða væl, betra um arbeiðsgongdir og tryggja, at arbeiðsorkan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Fyriskiparin skal eisini røkja samstarvið við okkara veitarar, gera avtalur við veitararnar, fáa tilboð til vega og tryggja, at tænasturnar eru í lagi og verða veittar rættstundis.

Tú verður ein lyklapersónur í fyritøkuni. Tú skalt síggja til, at arbeiði verða gjørd skynsamt og úrslitagott. Tú ert væl skipað/ur, hugsar logiskt og hevur gott yvirlit. Tú dugir væl at samskifta við fólk og hevur høgan sosialan intelligens.

Tú hevur hægri útbúgving ella royndir á økinum.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 38 starvsfólkum í trimum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum. Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Fyriskiparastarvið er eitt leiðarastarv, tí ført tú sjálvandi eina góða løn.

Umsóknin skal sendast við telduposti til Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo ella Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Vit skulu hava umsóknina í seinasta lagi kl. 16.00 mánadagin 12. november.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Høgna á tel 220401 ella Lenu á tel 218370. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Høgna ella Lenu.

SANSIR
sansir.fo




Søkt verður eftir reingerðarfólki til Spælistovuna til Dagrøktina í Kollafirði.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
saman við møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi innan fríggjadagin 2. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Trønd Ennistíg, dagrøktarleiðara, á tlf. 30 20 10.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna